# Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| Dagur: 20.september 2017<br>Tíð:kl 16.00 – 18.20 | Luttakarar: Allan, Bjørg, Vivian, Bjørghild, Jóhan og Marjun<br><br>Ikki møtt:Bergunn |
|---|---|

| **Dagsskrá** | | **Frásøgn** | **Málið** |
|---|---|---|---|
| 1. | Undirskriving av fundarfrásøgn (gerðabók) frá seinasta fundi (A) | Seinasta fundarfrásøgnin undirskrivað. | AM |
| 2. | Status viðvíkjandi skúlabygningunum | Unn Sørinardóttir og Sigurd Vang vóru við á fundinum fyri at greiða frá status viðvíkjandi skúlabygningunum. Hetta mál er komið á skrá í kjalarvørrinum av tí, sum hevði verið frammið í miðlunum í summarfrítíðini.<br>Tey greiddu frá, at tey vindeyguni, sum liggja niðri við jørð skulu skiftast út fyrst í komandi ári. Tað hevur kondensa nógv millum rútirnar í hesum videygunum.<br>Tað fer at verða gjørt eitt ”syn og skøn” av taki og klædningi og fer hetta arbeiði helst at taka nakrar vikur.<br>Óheft fólk í mun til til kommunu og trygging skulu gera hesa kanning. Í hesum liggur at tað skulu takst royndir av bæði taki og klædningi.Ilt er enn at siga, hvussu langa tíð tað kemur at taka, áðrenn endaligt úrslit fyriliggur<br>Hugsast kann, at tann væntandi útluftingin millum vindsperrurnar sum er atvoldin til fukt.<br>Ringt er enn hjá kommununi at siga, nær farið verur undir umvælingar av klædiningi og taki. | AM/MH |
| 3. | Skúlagarðurin, ætlanin, ið fyriliggur | Nú verður farið undir verkætlanina við garðinum í vikuni fyri heystferiuna í feriuni.<br>800.000 kr frá seinasta fíggjarár eru tøkar og 100.000 kr frá hesum fíggjarárinum.<br>Lendið sunnan fyri grunddeildina skal planerast og síðan gerast klárt við einum falliundirlagi so at trygdarkrøvini eisini eru rokkin.<br>Hjálpirót skal gera arbeiði og keypa leikurnar.Hugt hevur verið eftir øðrum tilboðum, men teirra tilboð var mest nøktandi.<br>Á tað planeraða øki skal setast ein minni borg, fyri tann pening sum leypur av, tá ið lendi er gjørt klárt.<br>Valið hevur verið, at fáa borgina úr træ, tí tað hóskar væl til umhvørvi og gevur fleiri møguleikar fyri fjølbroyttari útbygging, tá fíggjarorkan er lítil til at fáa fleiri leikur. | MH |
| 4. | Uppafturtøka av nøgdsemiskanning | Svarprosentið hevur verið ov lítið í trivnaðarkanningini og um kanningin skal nýtast til nakað er neyðugt við uppafturtøku. | MH |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | Skriv verða send út til tey foreldur, sum ikki hava svarað og fáa tey møguleikan at svara í komandi viku.<br>Fegin vilja vit hava eitt svarprosent á 60 – 70 %<br><br>Foreldraumboð hildu kanska, at kanningin var nakað troyttandi at svar, tí fleiri spurningarnir líktust í so nógv. | |
| 5. | Skúlaársbyrjan | | Skúlin er byrjaður væl aftur eftir summarferiuna<br>Trongu viðurskiftini uppi í grunddeild, eru til ampa fyri gerndisdagin har. Næmingar hava ilt við at halda skil á í hesum rokinum,nær tey eru í skúla og nær tey eru í frítíðarskúla. | MH |
| 6. | Setan av nýggjum fólkum | | Rakul Augustinusssen sett til ítrótt og 1.fl<br>Eyðbjartur Skaalum settur í 7.fl og 1.fl<br>Rudi Olsen sett fyri Astrið Breckmann, sum er farin í sjúkrafarloyvi. Hon er í 7.fl og hevur týskt. | MH |
| 7. | Kunning | | a) Landsroyndin, avtikin.<br>Foreldrini kundu hugsa sær at hildið bleiv áfram við  royndirnar, tí tað er óheppið ikki at fáa at vita, hvar barnið hjá einum liggur fakliga við eini landsumfatandi roynd.<br>Tað bleiv undrandi spurt, hví ongin hevði sett sær tann spurning, hvat hesar royndirnar í veruleikanum skuldu brúkast til<br>b) Skúlastýrið fór niðan at vitja ítróttarøkið. Víst bleiv á hetta óføra slætta økið, sum var komið uttan fyri høllina.Ein vøllur til hádeildina.<br><br>Vóru inni og vitjaðu høllina<br><br>c) Tosað bleiv  um vinarbólkar, fyri og ímóti hesum.<br>Skúlin kann ikki siga at vit skulu hava vinarbólkar, men at tað verður víst á at teir kunnu verða eitt amboð til at basa happing.<br>Hugsað verður serliga um, teir yngru flokkarnar. | MH |
| 9. | Komandi fundir | | **Í hesum skúlaárinum eru fundirnir mánadag.**<br><br>23.okt, 20. nov, 8.jan, 26.feb og 12.mars | |